Tvídráttur um setan av lækna í Klaksvík

Tvídráttur hevur tikið seg upp um setan av einum narkosulækna við Klaksvíkar Sjúkrahús. Sosialurin hevur fingið nøkur skriv um hetta mál frá bæði stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús og frá sjúkrahússtjóranum. Tey eru soljóðandi:

Tíðindi frá stýrinum

Sjúkrahússtýrið í Klaksvík hevur gjørt tilmæli til Landsstýrið um setan av Hans Jákup Simonsen sum narkosulækna við Klaksvíkar Sjúkrahús.

H.J.S. hevur í mong ár starvast við Odense sjúkrahús, er 41 ára gamal og ættaður úr Havn. Triggjar umsóknir vóru til starvið.

Hann hevur starvast á K.S. í sambandi við tær knæ- og skurðviðgerðir, ið eru gjørdar hesa seinastu tíðina. Sjúkrahúsið hevur til nú havt fyri neyðini at fáa serhjálp úr Danmark og skuldi hesin trupulleiki tí nú verið loystur. Samstundis verða viðgerðirnar meira tryggjandi og í samsvari við treytir, ið eru álagdar av heilsumyndugleikunum. Eisini vil ymisk útgerð koma betur til sín rætt í sambandi við setan av einum slíkum serlækna.

Stýrið viðgjørdi eisini niðurskurðin í figgjarlógini fyri 1990, ið svarar til 11,2% av verandi ætlan ella umleið 24% av føroysku figgjarætlanini. Stýrið vónar ikki, at niðurskurðurin kemur at nerva viðgerðarstøðið og vil venda aftur til málið um so skuldi verðið, sigur Stýrið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús í skrivi.

Skeiv framferð

Vísandi til at útvarpið friggjadagin 1. desember 1989, kl. 18.30 og leygardagin 2. desember 1989, kl. 10.00 bar tey tíðindi, at stýrið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús hevði innstillað lækna til starvið sum narkosulækni, verður hervið sagt frá, at hetta ikki er rætt.

Áðrenn setan (og hervið eisini innstilling) av yvirlækna skal Heilsustýrið sambært § 14, stk. 1 í læknalógini hava gjørt eina metan av umsøkjarunum.

Á stýrisfundi tann 1. desember 1989 var innstilling av narkosulæknastarvinum á skránni, men av tí at metingin av umsøkjarunum ikki fyrilá, gjørdi stýrið onga innstilling, sigur Høgni Joensen, sjúkrahússtjóri.

Misskilt

Sjúkrahússtýrið harmast úttalu hjá sjúkrahústjóranum í sambandi við innstilling av narkosulækna við Klaksvíkar Sjúkrahús.

Annaðhvørt hevur stjórin misskilt samtyktina ella eisini sína uppgávu sum sjúkrahústjóri og tá sum hjálp hjá stýrinum.

Vísandi til Kap. III grein 14 í læknalógini fyriskrivar hendan soleiðis: Inden en stilling som ledende læge ved sygehus eller anden større helbredsinstitution *besættes*, skal der indhentes en udtalelse fra Sundhedsstyrelsen om, hvilke ansøgere der er kvalificerede til stillingen.

Nú veit eg ikki hvør er juridiskur ráðgevi hjá sjúkrahústjóranum, men hann hevur ivaleyst ikki fangað, at vit hava *innstillað* og at tað er landsstýrið, ið setur.

So við hesum í huga mælti stýrið at innstilla til landsstýrið at seta Hans J. Simonsen, tá úttalan frá Sundhedsstyrelsen paragr. 14 nevndini fyrilá, hvat hendir um 14 dagar til 3 vikur.

Stýrið fann tað óneyðugt at leita aftur til fundar fyri at viðgera hetta av nýggjum, tá hetta einans kostaði tíð og pening.

Men fyri at sleppa undan fleiri misskiljingum er kallað saman aftur til fundar í vikuni, har gerðabókin bæði verður skrivað og góðkend.

S.v.
Asbjørn Joensen



